# Man Utd móti Inter

1/8-finalurnar í Champions League vórðu drignar fríggjadagin, og fleiri spennandi dystir eru sum vera man á skránni. Tað var Roma-legendan, Bruno Conti, sum dró liðini í áttandaparts finaluni móti hvørjum øðrum. Drátturin sær soleiðis út: Chelsea-Juventus. Villarreal-Panathinaikos, Sporting Lissabon-Bayern München, Atletico Madrid-FC, Porto, Olympique Lyonnais-FC Barcelona, Real Madrid-Liverpool, Arsenal-AS Roma, Inter-Manchester United. Hetta merkir, at Sir Alex Ferguson aftur skal kappast móti Jose Mourinho, sum var venjari hjá Chelsea fram til í fjør. Fyrru dystirnir verða leiktir 24./25. februar og seinnu 10./11. mars.



## Góð jólagáva

**Móti VÍF hevur H71 havt takið í ár, og hesa ferð var eisini tvingandi neyðugt at vinna, segði Regin Joensen eftir dystin sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Regin Joensen hjá H71 fegnaðist sum vera man um sigurin á fyrrverandi liðfeløgunum úr VÍF. Og tað gjørdi ikki bitan minni søtan, at sigurin kom júst nú, sum H71 hevði so alstóran tørv á hesum.

- Vit hava havt takið á VÍF í ár. Bæði í venjingardystum, har vit hava vunnið stórt tvær ferðir, og í fyrsta dystinum móti teimum í ár.

- Tí vistu vit, at møguleikin var til staðar, og eftir eina keðiliga viku, har vit høvdu tapt tvær ferðir á rað, so lovaðu vit hvørjum øðrum, at vit skuldu norður at geva okkum sjálvum eina góða jólagávu, sigur Regin Joensen.

Og hann staðfestir eisini, at greiði sigurin ber við sær, at VÍF nú av álvara er aftur í stríðnum um fremstu plássini.

- Ein sigur – og enntá stórsigur – í Vestmanna er sjávlandi góður fyri sjálvsálitið. Ikki minst nú vit máttu vera bæði Halgir og Johnny fyriuttan. Tá er gott at síggja, at aðrir eisini kunnu traðka til og taka ábyrgd, so hesin sigurin hevði heilt nógv at siga fyri okkum, sigur Regin Joensen.

VÍF-H71 25-33 (10-16):

# VÍF avbukaðir



*Vestmenningar hava higar til sýnt meistaraspæl, men sunnudagin fingu teir av at vita á egnum hallargólvi*

**Við stórsigri í Vestmanna meldaði H71 seg í gjár aftur í oddastríðið í Atlantic Airways-deildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var mest sum seinasta útkall. Eitt tap í Vestmanna bar við sær, at H71 var fýra stig aftan fyri bæði VÍF og Neistan, og tí vóru krøvini til hoyvíkingar eirindaleys sunnudagin. Og uppgávan gjørdist ikki lættari av, at H71 nú skuldi reisa seg eftir tvey tap á rað í landsog steypakapping.

Staðfestingin er, at H71 reisti seg. Sæð burtur frá fáu fyrstu minuttunum, har fleiri stórir møguleikar vórðu misnýttir, so vóru tað gestirnir, sum stóðu fyri undirhaldinum.

Miðskeiðis í hálvleikinum lupu teir av álvara avstað, og eftir hetta var ongan tíð nakar vegur aftur hjá VÍF. Ikki minst, tá teir eisini mistu Áka G. Olsen, sum noyddist av vøllinum við reyðum korti frá dómarunum. Seinastu 12 minuttirnar undan steðginum fór H71 frá 9-10 til 10-16 á talvuni, og eftir steðgin góvu teir ongan tíð nøkur sum helst tekin um, at teir ætlaðu sær at slaka.

Vestmenningar royndu at tátta nakað, men tá gestirnir aftur skoraðu fýra ferðir á rað miðskeiðis í seinna hálvleiki, stóð stórsigur málaður á talvuni.

### Kærkomin steðgur

Og so kann bara staðfestast, at hoyvíkingar so ruddiliga enn eru partur av oddastríðnum í deildini.

Seinastu umførini hava víst, at finalistarnir í FM-kappingini helst skulu finnast millum Neistan, VÍF og H71. Enn eru hoyvíkingar á triðja plássinum í hesi kappingini, men Neistin og VÍF hava ein dyst sínamillum tilgóðar, og tá verður tað neyvan so, at báðir partar fara av vøllinum við fleiri stigum.

Og við bæði Halgir Dahl Olesen og Johnny Durhuus á skaðalistanum, kann jólafrítíðin væl merkja, at tað verður eitt styrkt H71-lið, sum kemur á vøllin hinumegin ársskiftið.

Hjá VÍF kemur jólaferian eisini væl við. Eftir at hava havt fullar snúningar mest sum alt kappingarárið, kom av álvara stígur í, tá teir í vikuni – sum vant – máttu lúta fyri StÍF í steypakappingini.

Stórtapið sunnudagin bendir eisini á, at ein lítil steðgur nú av álvara er tiltrongdur. Hesa ferð var tað bert Sámal Joensen, sum tað glógvaði í, og tað er ov lítið, tá tikist verður við tey stóru í deildini.

### FAKTA um dystin

**VÍF-H71 25-33 (10-16)**
10 min: 5-5
20 min: 9-11
40 min: 16-22
50 min: 19-26
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sámal Joensen 13(6), Niels Andreasen 3, Karl Johan Djurhuus 3, Joen Pauli Høgnesen 2, Rúni Joensen 2, Agnar Joensen 1, Jákup Suni Andreasen 1
**H71:** Dánjal Tórgarð 8(3), Janus Sørensen 6, Esbern Patursson 5, Gunnar Bláberg 4, Poul Kjartan Dam 4, Danni Syhler 2, Regin Joensen 2, Bárður Brimvík 1, Niels Viggo Niclasen 1
**Brotskøst:** VÍF 8, H71 4
**Útvísingar:** H71 3
**Diskvalifikatión:** VÍF 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

# Bárður í steypafinalu

**Bárður Bendix Mikkelsen er til reiðar at spæla sín fjórðu steypafinalu í donskum flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin vann Marienlyst Volley seg í donsku steypafinaluna í flogbólti.

Marienlyst spældi á útivølli móti Gentofte, og her megnaðu Bárður og liðfelagarnir uttan stórvegis hóvasták at vinna 3-0. Hin hálvfinalan stóð millum Ålborg HIK og Middelfart VK, og hendan dystin vann Ålborg somuleiðis 3-0.

Talan er um fjórðu donsku steypafinaluna, sum Bárður verður partur av. Í fleiri ár spældi Bárður við Holte, og bæði í 2001 og í 2002 spældu teir seg í finaluna. Og seinnu ferðina megnaðu teir enntá at vinna hana.

Í fjør var Bárður saman við Middelfart í finaluni, men ta ferðina taptu teir dystin.

Danska flogbóltsfinalan verður spæld í Odense tann 25. januar.



*Bárður B. Mikkelsen hevur tríggjar ferðir áður spælt steypafinalu í donsku flogbóltskappingini*